LM-053/2025

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

Dagfest.04.11.2025

Stíla: Løgmálaráðið

Evni: Høringssvar – uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli (§ 6 a)

SSP-hoyringssvar

SSP-samstarvið takkar fyri møguleikan at geva sítt íkast til lógaruppskotið um at heimila kommunum at seta upp vakmyndatól á almennum økjum.

Sum samstarv millum skúlar, sosialar myndugleikar og politi, arbeiðir SSP við fyribyrging, tryggleika og trivnaði, serliga millum børn og ung. Úr einum kriminologiskum og fyribyrgjandi sjónarhorni vilja vit seta sjóneykuna á nakrar týdningarmiklar tvístøður:

1. **Fakligan javnvág**
   Lógaruppskotið leggur metingina av, hvar vakmyndatól skulu setast upp, bert í hendurnar á politinum. Vit meta, at fakliga ábyrgdin eigur eisini at fevna um kriminologiska og sosiala fakligheit. Gransking vísir, at yvirvøka í sær sjálvum ikki hevur stóru ávirkanina á fyribyrging, og í besta føri er heldur talan um falskan tryggleika. Trygdin verður best styrkt gjøgnum menniskjalig sambond og lokal tiltøk, í savnar ymiskar málbólkar. Hvat verður skilt sum at betra um trygdina í útsettum økjum í kommununi, eigur at definerast betri og má eitt útgangsstøði vera áðrenn og eftirmeting aftaná. Annars kann slíkt ikki orðast, um hettar ikki verður kanna nærri.
2. **Mentanargrund og føroyskt samfelag**
   Í einum lítlum samfelagið sum Føroyar, er álit og felagsskapur av stórum týdningi. Serliga er sosial kontrol fyribyrgjandi og viðvirkar til tryggleika. Hettar tí avleiðing av at skaða onnur, fær ov stórar sosialar avleiðingar fyri ein, í lítlum samfelag. Ov stórur dentur á yvirvøku fjernar ábyrgdina frá einstaka borgaranum, kann skapa stóra fjarstøðu og misálit – serliga millum ung og myndugleikar.
3. **Meting av "serliga útsettum økjum"**
   SSP vísir á, at meting av "serliga útsettum økjum" kann hava við sær stigmatisering av útvaldum økjum og møguliga borgarum. Eisini metir SSP, at skrásetingarskipanin hjá Føroya politi ikki gevur nøktandi grundarlag fyri eina neyva fakliga meting av slíkum økjum, vegna avmarkingar í journalskipanini. Slíkar metingar eiga at gerast í samráð við fleiri partar, sum borgarar, SSP økisbólkar og onnur.
4. **Grundarlag undir slíkt intriv**
   Uppskotið eigur at standa í mát við tørvin. Í hesum førum meta vit ikki at at grundlagið er nóg sterkt, tá víst verður til ógvuslig lógarbrot, ið geva yvir 3 ára revsing. At bert í slíkum førum, kunnu upptøkur brúkast til kanningararbeiði av politinum. SSP vil fegin fáa upplýst hvussu nógv politimál hava verið, av persónfarligum kriminaliteti, har uppkláringararbeiðið ikki bar á mál, og tørvur tí er á vakmyndatólum. Um talan er um

ongin til sera fá mál, meta vit ikki at slíkt intriv, og ávirkan á okkara samfelag, tænir endamálinum um uppkláring av politimálum. Eisini er fíggjarliga grundlagið av stórum týdningini, til so stóra íløgu, sum uppsetan og viðlíkahald av vakmyndatólum.

5. **Tilráðing**
   SSP mælir frá vakmyndatólum í almenna rúminum, men heldur verða tiltøk sett í verk at betra um ábyrgdarkenslu borgarans og styrkir um sosialt kontrol, har vit bera eyga við hvønn annan. Sum fyribyrging til ung, kunnu skipanir sum náttarravnar og SSP styrkjast, í samband við tiltøk har rúsdrekka er uppi í, sum til festivalar.

   Um uppskotið verður samtykt, at møgulig yvirvøka verður grundað á fakliga ráðgeving frá bæði **politi og brotsfrøðingum**, í samstarvi við **kommunur, viðkomandi stovnar og feløg, og borgarar**. Harumframt eigur at verða gjørd ein **eftirmeting**, har kannað verður, hvussu trygdin er fyri ymisku aldursbólkar og um yvirvøkan veruliga styrkir tryggleikan.

Vinarliga

Daisy J. Iversen, SSP-ráðgevi

vegna

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

SSP-ráðgevingin
R. C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
Tel. 30 24 80